*Statoil í Danmark fegnast um stórt oljufund í donskum øki*

# Hava funnið eina stóra oljukeldu

*Danska Statoil, sum er millum mest virknu oljufeløgini at leita eftir olju og gassi í føroyskum øki, hevur saman við danska felagnum Danop gjørt eitt sera stórt oljufund í Siriøkinum nærhendis norska markinum.*



*Hesir kunna fegnast, tí Statoil og Danop hava funnið størstu keldana í donskum øki síðani 1977. Fv. Vidar Larsen, jarðfrøðingur hjá Statoil í Danmark, Bjørn Vidar Larsen, pressutalsmaður hjá Statoil í Noregi, Svein G. Larsen, stjóri hjá Statoil í Danmark og Kai Nielsen, pressustjóri hjá Statoil í Danmark. Her eru teir avmyndaðir undir vitjan í Føroyum.*

Statoil tykist hava eydnuna við sær, ikki bert í norskum øki í Norðsjónum men nú eisini í danska partinum av Norðsjónum. Har hevur danska Statoil-felagið funnið eina stóra oljukeldu, sum rúmar í minsta lagi 150 mill. tunnur av olju. Oljan hevur eitt samlað virði upp á einar 15 milliardir krónur og er nóg mikið til at nøkta allan tann danska oljutørvin í trý ár.

Keldan talan er um liggur í tí sokallaða Siri-lisensinum, sum er skamt frá norska markinum.

Statoil Danmark er operatørur í hesum lisensinum og stendur fyri 50% loyvinum. Hini luttakandi oljufeløgini eru Enterprise Oil, 20%, Denerco, 10% og Dansk Olie og Gasproduktion, 20%.

Danska felagið Danop hevur verið hjáoperatørur hjá Statoil undir boringini.

Hetta er felagið, sum skal standa fyri boringini í Lopra í næsta ár.

Tá Sosialurin var á vitjan hjá Statoil í Noregi fyrr í ár, varð nógv gjørt burtur úr at greiða frá ætlanunum hjá Statoil í øllum trimum pørtunum av danska kongaríkinum, tvs. bæði í donskum, føroyskum og grønlendskum øki.

Tá var heitið á fyrilestrinum hjá stjóranum hjá Statoil í Danmark, Svein G. Larsen: "Frá Siri til Lopra". Svein Larsen greiddi frá arbeiðinum hjá Statoil og tess samstarvsfeløgum í Siri-lisensinum og vónirnar til at at finna olju har. Føroyski jarðfrøðingurin Petur Norðgerð, sum tá starvaðist hjá Statoil í Danmark hevði nettup til uppgávu at tulka seismikk frá Siri.




*Hetta kortið hjá Statoil í Danmark vísir áhugamálini hjá felagnum í danska kongaríkinum. Í Siri hava teir nú rakt við olju og arbeitt verður eisini í bæði føroyskum og grønlendskum øki.*

Nú er so olja funnin í Siri. Spurningurin er so, um Statoil saman við øðrum oljufeløgum fer at hava eydnuna við sær, tá farið verður undir at bora í Lopra næsta ár.

Eftir tí Sosialurin skilur, so seta Statoil serfrøðingar stórar vónir til Lopraboringina. Hóast teir ikki júst rokna við at raka við olju, so meta teir upplýsingarnar frá eini boring at hava ómetaliga stóran týdning fyri víðari leitingina eftir olju í føroyskum øki.

**jan**

## Einki verkfall

Tað mundi endað við verkfalli, tí fólkini, sum arbeiddu hjá Fiskavirking í Fuglafirði ikki høvdu fingið ta løn teimum var lovað at fáa fyri jól.

Føroya Arbeiðarafelag hóttu fyrrapartin í gjár við tiltøkum, men so gjørdi Fiskavirking vart við seg, og fólkini skuldu seinnapartin fáa sína útsamans hálvu millión krónur.

**randi**

HEIMSINS BESTU...............
HÁTALARAR FYRI PRÍSIN
FØROYA MEST SELDU 450



Fyri hvønn
Kontant EINANS 2.450,-
DALI
dm tronic Sverrisgøta 15 · Box 2125 · 110 Tórshavn · Tlf. 17497

THE WORLD COUNTS ON TRULY®



MD 183 kr. 595,-
SPARD KRÓNA ER VUNNIN KRÓNA
pappírslonin
Sverrisgøta 9 • FR-110 Tórshavn
Tlf 10603 • Fax 10806 • Box 195

Frá
Maskinmeistarafelagnum
Aðalfundurin verður 23. mars 1996.
Tíð og stað verður lýst seinni
Nevndin

**Norrøni eftirskúlin í Hygum**
Pláss er fyri 2 næmingum eftir jólafríðina.
Skúlin byrjar aftur mikudagin 3. januar.
Áhugað kunnu venda sær til skúlan á tlf. 097836100 ella ringja tlf 56062 í Klaksvík.

**Grastransportari**
REFORM MULI 600 til sølu um høskandi boð fæst, vegna keyp av størri.
Tlf. 23071